# Todi brúkti aftur høvdið

**Start eigur framvegis fyrsta sigurin til góða, og tað kann væl vera, at Todi Jónsson ikki verður førur fyri at spæla móti Vålerenga í morgin**

ROYALA LIGAN
*Jóannes Hansen*



*Todi er nú greiður toppskjútti í Royalu liguni, men tað kom illa við, at hann noyddist skaddur av vøllinum móti FC Midtjylland*

Todi Jónsson hevur verið so nógv tann málsóknasti Start spælarin í Royalu Liguni higartil í heyst. Tað hevur hilnast illa hjá Start, sum í trimum teimum fyrstu royndunum bara hevur megnað ein javnleik. Hóskvøldið endaði tað 1-1, tá ið FC Midtjylland vitjaði. Todi Jónsson legði Start á odda, tá ið eitt korter var farið. Úr fimm metrum smekkaði hann høvdið undir bóltin eftir horna.

FCM javnaði eftir ein hálvan tíma, og í 2. hálvleiki vóru tað gestirnir, sum vóru betri. Todi var ikki á vøllinum eftir steðgin. Hann var plágaður av skaða í hælsinuni, og tað kann væl vera, at hann ikki verður førur fyri at spæla sunnudagin, tá ið Vålerenga fer at vitja. Start hevur heimavøll í Skien, tí vøllurin í Kristiansand er ikki nóg góður at spæla á hesa ársins tíðina. Í kuldanum hóskvøldið vóru 63 áskoðarar í Skien!

Mánadagin fara teir í vetrarfrí í Start. Úrslitini nógvu tær seinastu ferðirnar benda á, at spælararnir eru troyttir og meiri enn nøkrum øðrum hava tørv á hvíld og á at koma fyri seg.

Millum Vålerenga og Hammarby endaði tað málleyst. Start hevur bara eitt stig, og hini trý feløgini hava fýra stig. Tað er alneyðugt hjá Start at vinna sunnudagin, um hugsningur skal vera um at enda millum tey bæði ovastu.

Í bólki tvey vann Lillestrøm 2-0 á útivølli móti Kalmar. Harvið legði norska felagið seg við fimm stigum klárt á odda. Øll hini feløgini hava tvey stig, men FCK og Brøndby hava bara spælt tveir dystir, meðan hini hava verið tríggjar ferðir í eldinum.

Tað var um reppið, at Brøndby hóskvøldið vann í Parkini. Johan Elmander legði tíðliga gestirnar á odda, men tá ið 2. hálvleikur var 47 minuttir gamalur fekk FCK ivasamt brotsspark, sum norski vongverjin, Andre Bergdølmo, umsetti til mál.

Í bólki 3 var talan um stórt undirhald, tá ið AaB var í Göteborg og spældi móti IFK. Úrslitið var 3-3, eftir at heimaliðið hevði verið á odda 3-1 í 52. minutti, og ein spælari í hvørjum partinum sá reyða kortið. Stokhólmar felagið, meistararnir úr Djurgården, vunnu 2-1 í Oslo móti Lyn.

Svensku feløgini eru á odda í bólki trý. Djurgården hevur seks og IFK fýra stig. Lyn og AaB, sum hava ávikavíst trý og eitt stig, hava spælt tveir dystir og harvið ein færri enn hini bæði.

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Dráttur | 9 | 9 - 0 | 27 | 8 | 19 | 18 |
| 2 SÍ | 9 | 7 - 2 | 23 | 13 | 10 | 14 |
| 3 ÍF | 7 | 3 - 4 | 13 | 15 | -2 | 6 |
| 4 TB | 6 | 2 - 4 | 10 | 12 | -2 | 4 |
| 5 Mjølnir | 9 | 2 - 7 | 12 | 24 | -12 | 4 |
| 6 KÍF | 8 | 1 - 7 | 9 | 22 | -13 | 2 |

## Hondbóltsstøður

SUNSET KAPPINGIN
KVINNUR

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 11 | 10 - 0 - 1 | 323 | 213 | 110 | 20 |
| 2 Neistin | 12 | 10 - 0 - 2 | 329 | 231 | 98 | 20 |
| 3 VB | 11 | 8 - 0 - 3 | 298 | 232 | 66 | 16 |
| 4 Kyndil | 11 | 7 - 0 - 4 | 233 | 249 | -16 | 14 |
| 5 VÍF | 11 | 5 - 0 - 6 | 264 | 264 | 0 | 10 |
| 6 StÍF | 12 | 3 - 0 - 9 | 270 | 307 | -37 | 6 |
| 7 Søljan | 11 | 2 - 0 - 9 | 195 | 288 | -93 | 4 |
| 8 Tjaldur | 11 | 0 - 0 - 11 | 208 | 336 | -128 | 0 |

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN
MENN

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Kyndil | 9 | 7 - 1 - 1 | 250 | 215 | 35 | 15 |
| 2 H71 | 9 | 6 - 1 - 2 | 266 | 215 | 51 | 13 |
| 3 VÍF | 9 | 5 - 0 - 4 | 252 | 251 | 1 | 10 |
| 4 StÍF | 9 | 5 - 0 - 4 | 231 | 239 | -8 | 10 |
| 5 KÍF | 9 | 2 - 0 - 7 | 229 | 258 | -29 | 4 |
| 6 Neistin | 9 | 1 - 0 - 8 | 243 | 293 | -50 | 2 |

# Oddabrak í Havn

**Talan verður kanska um fremstu styrkisroyndina á árinum, tá Stjørnan kemur til Havnar á vitjan**

SUNSET-KAPPINGIN
*Jákup Mørk*

Í Klaksvík hevði Neistin í góða løtu eitt sera gott tak á Stjørnuni, tá liðini hittust fyrr í heyst. Hetta takið varð tó fullkokmuliga slept, tá gestirnir einki mál fingu í einar 20 minuttir, og stórsigurin hjá Stjørnuni líktist tá eini staðfesting av, at Klaksvíkskvinnurnar vóru í einum flokki fyri seg í Sunset-kappingini.

Síðani tá hevur tað tó gingið meira striltið hjá Stjørnuni at finna tær heilt stóru leikligu hæddirnar. Enn er liðið á odda, men í fleiri dystum hevur talan als ikki verið um so sannførandi avrik. Og tá Neistin eisini megnaði at reisa seg eftir stórtapið í Klaksvík, kann talan vær gerast um ein sera spennandi dyst sunnudagin.

**Kyndil vil halda fast um FM-spælið**

Umframt oddadystin, so er talan eisini um hópin av øðrum dystum í kvinnudeildini.

Leygardagin eru tríggir dystir á skránni, og her tykist tann mest áhugaverdi at vera tann í Vági, har Kyndil kemur á vitjan. Kyndil tóktist eitt skifti veruliga at arga tey trý oddaliðini, men við tveimum tapum á rað er nú líkt til, at hóttanin ikki var heilt so stór kortini.

Sunnudagin er talan tó kanska um størsta takið hjá Kyndli. Tær vitja tá á Skála, og tað er ein dystur, sum skal geva stig, um sessurin í FM-endaspælinum skal varðveitast.

VÍF kunnu tó eisini sjálvar gera sítt til, at tær skulu taka hendan sessin. Tær vitja í Vági sunnudagin, og megna tær at taka stigini her, so koma tær ájavnt Kyndli. Hetta er tó treytað av, at Kyndil ikki fær stig í Vági leygardagin. Og sum so man hesin útidysturin eisini vera so toluliga møtumikil hjá VÍF.

# Stríðið um oddasessin

**Kyndil hevur alt grundspælið verið á odda, men um vikuskiftið kunnu teir missa hendan sessin, tá seinasta umfarið í grundspælinum hjá monnum stendur á skránni**

ATLANTIC AIRWAYS-KAPPINGIN
*Jákup Mørk*

Útidysturin á Skála er uttan iva ein av heilt truplu uppgávunum hjá Kyndli. Men tað er ein sannroynd, sum teir grønu ikki hava serlig ráð at hugsa um. Enn eru hoyvíkingar í hølunum á teimum, og munurin er nú somikið lítil, at H71 við einum sigri kann taka seg ájavnt Kyndli í stigatali.

StÍF byrjaði árið sera illa, men teimum so líkt, so hevur liðið vundið seg alt meira upp. Enn restar tó seinasta pettið móti oddinum, men megna teir at fáa fulla úrtøku sunndagin, eru eisini teir av álvara við í oddastríðnum, sum tá telir fýra lið.

Hinir báðir dystirnir hetta vikuskiftið hava meira greiðar favoritt-leiklutir. H71 átti ikki at havt stórvegis trupulleikar, tá teir taka ímóti KÍF, og tað sama kann helst sigast um VÍF, sum á heimavølli fær vitjan av Neistanum.

## Dystir um vikuskiftið

**Hondbóltur - Sunset-kappingin**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 10.12 | 14.30 | VÍF-Søljan | Rúni & Ragnar |
| 10.12 | 15.30 | VB-Kyndil | Kristian & Sámal |
| 10.12 | 17.00 | Tjaldur-Neistin | Kári & Dánjal |
| 11.12 | 14.30 | StÍF-Kyndil | Kristian & Sámal |
| 11.12 | 15.00 | Søljan-Tjaldur | Karsten & Kristian |
| 11.12 | 15.00 | Neistin-Stjørnan | Heri & Dánjal |
| 11.12 | 15.00 | VB-VÍF | Hallur & Petur |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 11.12 | 16.00 | H71-KÍF | Eyðun & Andreas |
| 11.12 | 16.00 | StÍF-Kyndil | Kristian & Sámal |
| 11.12 | 16.00 | VÍF-Neistin | Kári & Dánjal |

**Meistaradeild kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 11.12 | 15.00 | TB-ÍF | Mjølnir |